## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Um morgunin hvassur vindur av útsynningi og eitt skifti regn ella vátaslettingur, men sum frálíður minni vindur av vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 1 og 4 stig, men um kvøldið lýggjari.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri, seinnapartin upp í skrið av útsynningi. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin.**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Unn í Norðurlandahúsinum

**Bólkurin Gloymska við Grape, har Unn Patursson er sangari, fer at hava konsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Sunnudagin verður Gloymska við Grape í Norðurlandahúsinum.

Talan er um eina konsert við bólkinum, har songkvinnan Unn Patursson stendur á odda.

Gloymska við Grape var heitið á fløguni, sum Unn Patursson lat úr hondum ein av fyrstu døgunum í hesum árinum. Hetta var ein fløga við popptónleiki, sum tó eisini fer sær dælt av tónum og ljóðum, sum verða meira brúkt í øðrum tónleikastílum.

Ein spennandi fløga, har Unn Patursson gekk undan við einum frálíkum sangavriki gjøgnum alla fløguna.

Á konsertini sunnudagin fer Unn at hava tvær aðrar songkvinnur afturat sær. Tær eru Malan Eyðunsdóttir og Laila Carlsen.

### Nýtt og gamalt

Tað verða sangir av útgávuni Gloymska við Grape, sum bólkurin fer at spæla í Norðurlandahúsinum sunnudagin.

Harafturat hevur bólkurin eisini vant gomul og kend løg, sum tey fara at framføra sínar egnu útgávur av.

Tey, sum spæla í bólkinum, eru Unn Patursson (sang), Malan Eyðunsdóttir (kór og sang), Laila Carlsen (kór og sang), Finnur Hansen (ljómborð og kór), Herluf Lützen (gittar og kór), Rógvi á Rógvu (trummur), Brandur Jacobsen (slagverk og trummur) og Bjarki Meitel (bass og slagverk).

Konsertin verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin klokkan 16.00, og atgongumerki fáast í forsølu í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni í Havn.



*Bólkurin Gloymska við Grape fer at hava stóra konsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | ÷8 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 9 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 972 hPa. millum Íslands og Føroya fer norðureftir og dýpist. Brúgvalagið yvir Føroyum fer eystureftir.




Eitt lágtrýst tekur seg upp við Azorurnar og fer í landnyrðing. Tað verður væntandi við Føroyar fríggjamorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/12 kl. 06⁰⁰– 04/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 03/12 kl. 06⁰⁰– 04/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 13,5 mm


HESTPRENT Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397


## VESTFALLSKYRRINDI

30. nov.: Fullmáni
6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. des | 09.59 | 22.25 | 08.59 | 21.25 | 09.14 | 21.40 | 11.59 | — | 00.33 | 12.59 | 08.14 | 20.40 | 07.14 | 19.40 | 10.14 | 22.40 | 11.14 | 23.40 | 09.44 | 22.10 | 10.59 | 23.25 |
| 6. des | 10.50 | 23.30 | 09.50 | 22.30 | 10.05 | 22.45 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 | 09.05 | 21.45 | 08.05 | 20.45 | 11.05 | 23.45 | — | 12.05 | 10.35 | 23.15 | 11.50 | — |
| 7. des | — | 12.10 | 11.10 | 23.48 | 11.25 | — | 01.30 | 14.10 | 02.30 | 15.10 | 10.25 | 23.03 | 09.25 | 22.03 | — | 12.25 | 00.45 | 13.25 | 11.55 | — | 00.30 | 13.10 |
| 8. des | 00.48 | 13.26 | — | 12.26 | 00.03 | 12.41 | 02.48 | 15.26 | 03.48 | 16.26 | 11.41 | — | 10.41 | 23.04 | 01.03 | 13.41 | 02.03 | 14.41 | 00.33 | 13.11 | 01.48 | 14.26 |

5 707265 100036 >